## VALGREINAR

# Verulig vælferð í egnum landi

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Rættilig vend er komin í føroyska búskapin hesi seinastu fýra árini, meðan tjóðveldisflokkurin hevur umsitið búskaparpolitikkin.

Tá samgongan legði til brots í 1998, var samfelagið niðurpínt og ongin kós hómaðist úr óførinum. Nú eru mong høvuðsmál loyst og hyggjast kann aftur á ein næstan óhoyrdan framburð.

Neyvan nakrantíð hevur eitt samfelag reist seg so skjótt úr øskuni og hevur skapt so nógv virðir, sum Føroya fólk hevur gjørt seinastu fýra árini.

Stórt avlop hevur verið á fíggjarlógini. Skuld er goldin niður. Blokkurin er lítið brúktur. Spart er upp í landsbankanum. Samstundis er játtanin til almanna- og heilsumál hækkað meir enn 400 mió kr.

Fólkapensjónin er hækkað munandi meir enn nakrantíð áður. Ein føroyskur fólkapensjonistur, sum ikki hevur aðra inntøku, fær í dag 1700 kr. meir um mánaðin, enn hann fekk fyri fýra árum síðani.

Fyritíðarpensjónin er hækkað nógv og verður nú prístalsviðgjørd. Barnafrádátturin er hækkaður. Bøtt er munandi um skattaviðurskiftini hjá pensjonistum. Og sum heild eru veittar 150 mió kr. í skattalætta.

Munandi størri partur av fíggjarlógini fer eisini til almannamál, heilsumál, mentamál og útbúgving. Í 1990 fóru 55 % til hesi mál. Nú umboða tey 64% av fíggjarlógini.

Hetta vóru alt stig á leiðini. Búskapurin er nú førur fyri at taka upp á seg rættiligar batar á øllum trivnaðarøkinum.

Okkara stevna er, at eldrarøkt, dagsstovnar og bústaðir skula gerast ein rættur hjá øllum føroyingum. Vit vilja loysa hesi málini í semjum millum landið og kommunurnar.

Tann akutta tørvin á eldrarøkt vilja vit virka fyri at nøkta eftir fýra árum. Vit virka samstundis fyri, at eftir átta árum kann trygd veitast fyri plássi á sambýli ella røktarheimi eitt ár eftir at søkt er um pláss.

Vit vilja virka fyri at longja barsilsskipanina til farloyvi í eitt ár, sum arbeiðsmarknaðurin fíggjar, og virka fyri, at børn hava trygd fyri ansing eftir eitt ár.

Vit vilja virka fyri, at lógin um Húsalánsgrunnin verður broytt, so hann kann taka stig til og fíggja alternativa íbúðarbygging í samstarvi við kommunurnar

Tjóðveldisflokkurin vil eisini við lóg staðfesta rættindini hjá fólki við skerdum førleika.

Nógv er komið á skaftið og meir liggur í kortunum, hóast andstøðan vil vera við, at samfelagið er í sori. Hennara júkan um ómegd og dómadag byggir onki land.

Okkara sannføring er, at veruligar loysnir á trivnaðarmálunum eru fortreytir fyri, at vinnulívið heldur fram at mennast og at búskapurin heldur fram at vaksa.

Verulig vælferð byggir á okkara egnu framleiðslu og okkara egna tilfeingi. Hon er ein rættur hjá hvørjum einstøkum. Ikki ein olmussa frá øðrum.

Vel tí Tjóðveldisflokkin á valdegnum. Tá fær tín atkvøða veruliga ávirkan.

# Tey eldru skulu hava møguleika at velja sær bústað

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Tá tey, sum hava lagt alla sína orku í samfelagið, og gerandisdagurin hjá teimum líður móti kvøldi, skulu tey hava møguleika fyri at velja, um tey ynskja at búgva í húsunum - ella at fara í eina hóskandi íbúð

Sambandsflokkurin hevur ta stevnu, at tey eldru skulu hava møguleikan at búgva í egnum húsum.

Eisini skal tað miðjast fram ímóti at gevu teimum eldru ein valmøguleika, við at leggja ein bústaðarpolitikk tilrættis, soleiðis at møguleiki er fyri at fara úr húsunum í eina íbúð, sum hóskar betur til gerandisdagin.

# 50 nýggj vard størv komandi fýra árini

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin bindir seg til at skapa í minsta lagi 50 vard størv komandi fýra árini. Vit fara at seta viðurskiftini hjá fólki við skerdum førleika aftur á dagsskrá, eftir at hesi ikki eru raðfest politiskt seinnu árini. Øll hava rætt til eitt virkið lív, eisini teir føroyingar, sum eru verri fyri at fáa arbeiði, tí teir hava eitt brek at stríðast við. Brekið ger, at tann við skerdum førleika, ikki er á jøvnum fóti við aðrar umsøkjarar, tá hann fer at leita eftir arbeiði. Tí er hetta ein samfelagstrupulleiki, sum má takast upp. Eg havi í eini aðrari viðmerking víst á, at tað almenna hevur, sambært forsorgarlógini, skyldu at hjálpa teimum, sum ikki eru før fyri at klára seg sjálvi. Tíverri sigur lógin ikki nóg greitt, hvat slag av hjálp tann einstaki hevur rætt til, og tí er tað í fleiri førum upp til politiska myndugleikan at gera av, hvør hjálpin skal vera. Farnu árini hava víst, at hetta er ikki nóg gott.

**Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmsáttari**

Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmsáttari, og tá eigur landskassin at viðvirka, so at føroyingar við brekið eisini kunnu fáa eitt virki lív. Hetta má gerast so, at landskassin er við til at fíggja part av lønini, har brekið avmarkar arbeiðsførið hjá løntakaranum. Tí tað er als ikki so, at arbeiðsføri altíð er niðursett, hóast ein er brekaður. Sum dømi kundi verði nevnt, at blind eru fullfør at sita í móttøkuni og taka telefonina. Tað er neyvan nakar ivi um, at eitt betri skipað uppsøkjandi arbeiði hevði bøtt um støðuna, so fleiri komu á arbeiðsmarknaðin, men onkur má stinga út í kortið, so hetta verður gjørt.

**30 nýggj búpláss**

Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at útvega 30 nýggj búpláss, til fólk við breki, komandi fýra árini . Sitandi samgonga skírir útspæl Javnaðarfloksins fyri ábyrgdarleysan útgjaringarpolitikk. Men útrokningar vísa, at hetta fer at kosta uml 24 mio. kr., og at samlaði kostnaðurin av valskránni »Fólkið Fyrst« verður 116 mio.kr. netto fyri landskassan. So tað er als ikki av peningaligum ávum, at landskassin, sum hevur havt fleiri hundrað mio.kr. í yvirskoti seinastu fýra árini, ikki hevur gjørt nakað fyri okkara landsmenn við skerdum førleika. Ein kundi vent málinum á og sagt, at við einum politikki, sum hevur bygt á hugtakið "Survival of the fittest", hevur samgongan skapt eyka yvirskot í landskassanum. Hetta yvirskot er sett í Landsbankan at brúka til annað endamál.

# Var hjólið yvirhøvur uppfunnið, áðrenn Høgni kom til?

**Thomas Arabo**



Ongantíð fyrr hava vit gjørt hetta og ongantíð fyrr hava vit gjørt hatta. Hetta er í stuttum boðskapurin hjá formanni Tjóðveldisfloksins. Hann pástendur í allari beskeðinheit, at ongantíð eru skapt so nógv sosial framstig sum undir sitandi samgongu. Tað kemur kanska óvart á onkran, men fólkapensiónin, forsorgarlógin og ALS skipanin vóru gjøgnumførdar fyr nógvum árum síðani uttan nakran Høgna Hoydal.

**Blívu postkassarnir bláir av sær sjálvum?**

Heimsuppfatanin hjá formanni Tjóðveldisfloksins er í stuttum tann, at einki gott er hent millum 1948 og 1998. Tey framstig sum eru hend mugu verða komin av sær sjálvum, meðan alt tað ringa hevur heimastýrislógin skyldina av. Ein sera einføld heimsuppfatan, sum man tíverri roynir at trútta niður í ungdómin.

Tað eru ikki meira enn 30 ár síðani, vit høvdu reyðar postkassar og at hvør kvistur á einari skúlatekning skuldi til ríkisumboðið til góðkenningar. Hetta er ikki støðan longur. Hví man tað vera Høgni Hoydal? Er hetta hent av sær sjálvum?

**Ongantíð fyrr er so lítið hent sum nú**

Refusiónsskipanin varð avskaffað, og vit fingu blokkstuðul fyri minni enn 15 árum síðani. Hví hendi hetta? Tað kann eg fortelja Høgna Hoydal. Ein støðug sjálvstýristilgongd er farin fram í samfelagnum seinastu 30 árini. Ongantíð fyrr er so lítið hent á sjálvstýrisleið, sum undir sitandi samgongu. Gamaní, vit fingu eina hvíta bók, men at kalla tað eitt sjeymílafet á sjálvstýrisleið er í so nógv gjørt av.

# Versnað livikor við beinskerdari ríkisveiting

**Jákup Lindenskov**



Síðan Javnaðarflokkurin gjørdi seg galdandi í politikki, hevur fremsta málið verið at stuðla vinnandi fjøldini, og hevur tað ligið fremst at leggja haldgott grundarlag undir sosialu viðurskiftini í samfelagnum.

Tað hevur kostað hart stríð og mangan tungan mótbyrð frá hinum politisku flokkunum. Tað er so ein søga, sum í dag stendur mongum kám og mestsum verður duld í gloymsku. Harðvunnu rættindini skulu helst tigast burtur og ístaðin verða føgur frælsisorð spunnin; tey sosialu rættindindini, vit vunnu í samvinnu og í semju við danir fáa valla ljóð í dag, ja tað er næstan so, at tað má ikki sigast.

Spell, at meira er ikki gjørt burturúr at siga frá søgu Javnaðarfloksins, siga ungdóminum frá stóru stigunum, tikin vórðu, fyri at fremja mansømilig kor á so mongum samfelagsøkjum.

Í 60'unum og 70'unum var umfatandi nútímansgerð av heilsu- og sjúkhúsverkinum framd. Vit vóru í teirri støðu tá, at týðandi partar av allari sjúkuviðgerð, læknaviðgerð, ikki fekst í Føroyum. Nógvir føroyingar máttu av landinum, ikki so fáir med alla. Hesa støðu vildi Javnaðarflokkurin broyta, og tað hendi eisini.

Tað var ein av fremstu uppgávunum hjá landsstýrinum, sum tók við í 1959, og tað gav úrslit.

Við Javnaðarflokkinum sum leiðandi flokki í landsstýri og á tingi fingu vit reiðiliga gongd á nútímansgerðina av samfelagnum – fingu heimildir og fingu peningaorku, og møguligt varð at fremja stóru sosialu og heilsuligu frambrotini.

Í dag er tað ljótt at nevna orðið samvinnu og at vinna sømdir fyri land og fólk, tað má ikki vera við danskari hjálp.

Landsjúkrahúsið varð víðkað, nútímansgjørt – sálarsjúkrahúsið varð bygt. Vit fingu andveikraforsorgina at byggja í Føroyum og fasta fígging til útbygging av ellis- og røktarheimum, at vit so hvørt samfelagið broyttist og arbeiðslagið kravdi tað, fingu neyðugu loysnirnar.

Í dag er næstan alt hetta niðurslitið, og myndugleikar okkara hava ført okkum djúpt í afturhond, givið avkall uppá fíggjarorku, sum vildi bjarga okkum virðilig kor á hesum økjum.

**Áhaldandi stríð**

Aðalspurningurin er framvegis fígging. Uttan pening gertst so lítið.

Uttan fastar íløgur frá stati/landi, bar illa til at seta nakað í verk. Vit loystu hesi mál tá, og nú hava vit givið avkall langt áramál til at kunna bøta um tað nógva, sum er komið í afturhond.

Ein flokkur vildi vinna føroyingum betri sømdir og hevði dirvi til at stríðast fyri hesum málsetningi.

Hóast tú meira enn so hoyrdi háðandi røddir frá øðrum flokkum, at hatta ikki fekst í lag, so gekk kortini, tí Javnaðarflokkurin gavst ikki á hondum.

**190-miljónaætlanin og 60 miljónagrunnurin**

Javnaðarflokkurin legði fyri við søguliga 190-miljónapláninum um útbygging av samfelagnum og við tí so ofta umrødda 60 miljónagrunninum.

Ein lógfesting av grunni, sum serliga skuldi fáa pening til bygging av ellis- og røktarheimum. Fyrsta heimið við hesi fígging var heimið í Vágunum. So var føst raðseting sett, og ellis- og røktarheim vórðu bygd 1) í Suðri, 2) Norðoyum, 3) Eysturoy.

Vit vistu, at peningur fór ikki at røkka víðari, og broyttu íløguna frá 2 til 4%. Umframt nevndu raðfylgju varð játtað útbygging av ellisheiminum í Havn, sum var tikið í brúk síðst í sjeytiárunum.

**Fólkapensjónin**

Týdningarmesta málið hjá Javnaðarflokkinum var fólkapensjónin. Í dag sær út, sum allir flokkar eiga æruna av hesum máli.

Øðrvísi var, tá Javnaðarflokkurin reisti málið í 1957.

Í samrøðu, sum Sosialurin hevði við J. Fr. Øregaard, tá hann í 1978 legði frá sær sum tingmaður, sigur hann soleiðis:

»Eitt annað mál, sum Javnaðarflokkurin hevur lagt alstóran dent á, var fremjanin av fólkapensjónini.

Í dag sær út, sum allir eiga æruna av hesum. Øðrvísi var, tá vit tosaðu um fólkapensjónina á sinni.

Frá 1950-1958 vóru vit í andstøðu, og tað var ikki alt, ein flokkur í andstøðu fær framt. Vit høvdu hesi árini ein hóp av ymiskum uppskotum, men tað var so langt frá, alt varð samtykt.

Soleiðis eisini við uppskotinum um fólkapensjón, sum vit løgdu fram fyrstu ferð í 1957.

Vit fingu ikki uppskotið ígjøgum. Bert ein sambandsmaður atkvøddi fyri okkara uppskoti. (G. L. Samuelsen, sáli, júst tá varamaður á tingi).

Men eftir valið í 1958 fóru vit í samgongu við Sjálvstýrisflokkin og Sambandsflokkin, og varð tá tingast um, eins og nú, hvørji mál hvør flokkur vildi hava framt.

Fyri javnaðarflokkin var tað avgerandi at fáa fólkapensjónina framda tá, og tingast varð um, hvat skuldi standa ovast í setningi samgongurnar. Vit vildu hava fólkapensjónina fyrst á skránna, meðan sambandsmenn fyrst vildu hava útbygging av vinnulívinum. Vit samdust so um at seta hesi bæði javnt.

Nú sigur tú, at allir vildu taka sær æruna av fólkapensjónini. Rætt er tað, at í aðru syftu atkvøddu allir fyri henni, men tann, sum kom við uppskotinum og kravinum, var Javnaðarflokkurin. Tað skerst ikki burtur.«

**Peningaorka avgerandi**

Javnaðarflokkurin hevur ongantíð smæðst burtur, tá tað ráddi um at fáa til vega peningaorkuna, um røkkast skuldi á mál.

Flokkurin stóð óræddur, hóast aðrir hoknaðu, tí teir tordu ikki at viðganga, at vit røkka ikki øllum málum uttan í samvinnu við ríkismyndugleikarnar.

Tað er meira enn hættisligt fyri framtíðina, verða vit so hástórir, at vit einki gera, tí vit mugu ikki standa undir liðini á teimum, sum vilja samvinna á ríkisleið. Úrslitið av hesum politikki fer at enda í kaos.

Fráfarandi landsstýri hevur ført okkum í óføri, sum fer at tarna framburði og menning samfelagsins langt áramál.

Og tí fara livikorini hjá fólki at versna.

Komandi valdagur 30. apríl er lagnudagurin, har gongdin kann vendast aftur.

Flokkurin, sum avgjørdur kravdi fólkapensjónina framda í 1959, kann lyfta hetta niðursmokkaða mál upp aftur á mannsømiligt støði.

# Tyrluflúgving og útoyggjar

**Tummas Frank Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Sandoyar valdømi*



Nú skal alt broytast við tyrluflúgving til útoyggjarnar. Sitandi landsstýrið setti sær fyri, at útoyggjarnar skuldu mennast aftur á tann hátt, at teimum skuldi gevast eins góð kor og øðrum borgarum í landinum. Rutusambandið skuldi bøtast og tyrluflúgving verða tvær ferðir um dagin onkrar dagar í vikuni.

Hetta vóru góð tíðindi fyri útoyggjafólk, men nú um dagarnar bar so útvarpið tey tíðindi, at ikki skuldi játtast meiri pengar til hesa flúgving. Tað sama ella kanska færri pengar skulu játtast, og er hetta eitt vónbrot fyri okkum í Skúgvi. Her er tyrlan nógv brúkt, og fólk eru ógvuliga glað fyri tyrluna. Skúvoy saman við Dímun ynskja, at tyrlan fer aftur at flúgva upp á Suðuroynna sunnudagar, sum hon fleyg at byrja við, ta ið henda ruta varð startað.

Kemur Javnaðarflokkurin aftur í stjórn landsins, vil hann virka fyri, at hetta verður veruleiki aftur. Eisini vil flokkurin virka fyri at gera bátahylin í Skúvoy nýtuligan til bátar longst møguligt av árinum. Møguleikar skulu gerast fyri, at Sildberin kann nýta bátahavnina. Her mugu streym- og aldumátingar gerast beinanvegin.

Vegir mugu gerast fyri arbeiðsplássum, sum t. d. smoltstøð og til eini hús, har allur fenaður, sum oyggin gevur, kann hagreiðast og frystast.

Ferðavinnan kann eisini gerast eitt ískoyti til dagligdagin, eisini má flutningurin av olju broytast og sleppast av við tunnurnar. Oljan kann verða pumpað gjøgnum rørleiðinga til hvørt einkult hús. Hetta vilja vit fremja í verki.

Skúvoyingar, Dímuningar og Sandoyggjarfólk! Latið okkum aftur í felag seta ein javnaðarmann á løgting.

# Frælsi? Hvat fyri frælsi?

**Páll Poulsen**



Tey ungu, sum nú fara á val fyri fyrstu ferð, noyðast at taka støðu til hvørja leið føroyingar skulu velja at halda – tað sonevnda frælsi hjá teimum loysingarsinnaðu, ella tað frælsi, sum samríkisflokkurin Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri.

Tað frælsi, sum loysingarflokkanir røða um, kann lættliga gerðast eitt frælsi fyri tey fáu vælbjargaðu í samfelagnum, og fyri øll hini eitt rættuliga svangligt frælsi. Tí um vit brádliga kvetta aldargamla og frælsa sambandi við Danmark, so kunnu vit lættliga gerðast trælir hjá einum øðrum norðurlendskum ríki, um á stendur. Her verða treytirnar ikki so frælsar, sum innan ríkisfelagsskapin.

Hjá sambandsflokkinum er "frælsi" ikki bara eitt háfloygt nationalromantiskt hugskot, men her verður lagdur dentur á at menna ein frælsan og mergjaðan ungdóm, sum virður og elskar fosturlandið, og sum fær høvi til sjálvur at velja framtíð sína innan verðandi karmar, í skúlagangi, øllum vinnugreinum og møguleikum at seta føtur undir egið borð.

Loysingarfólkini fara eisini at fyrigykla tykkum, sum nú skulu atkvøða fyri fyrstu ferð, at framhaldslesturin hjá føroyingum er ikki í vanda, um loysingin verður ein veruleiki, tí Norðurlond hava gjørt sínamillum avtalu um at taka móti lesandi frá hvørjum øðrum.

Men, longu nú eru danir farnir at tátta í, tí hópur av ungdómi úr hinum Norðurlondunum leitar sær til Danmarkar at lesa, tí umstøðurnar har eru so góðar, og taka soleiðis lestraplássini frá donskum ungdómum. Sum er, eru kvoturnar fyri norðurlendskum lesandi innan læknavísund munandi minkaðar, og hvat verður tað næsta?

Verður loysingin ein veruleiki, eiga føroyingar ikki at rokna sær sersømdir í danska ríkinum, tá verða Føroyar viðfarnar á jøvnum føti við hini Norðurlond, júst sum loysingarfólkini hava ynskt. Og tá livistøði í Føroyum er komið á botn aftaná loysingina, fara fáir ella ongir føroyskir ungdómar at hava ráð til at lesa í Danmark ella hinum grannalondunum.

Frælsi? Hvat fyri Frælsi? Ynskir tú at missa frælsi títt til at velja skúla í ríkinum ? Ynskir tú eitt frælsi, sum enn bara er heilaspuni hjá loysingarfólkinum? Ella ynskir tú eitt roynt frælsi innan heimsins frælsastu karmar? Um so er, vel SAMBANDSFLOKKIN!